*- Eg vóni, at spælararnir ikki ræðast uppgávuna, men velja at taka hetta sum eina velduga uppliving, har teir so vilja gera sítt alllarbesta.*
*Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari í fótbólti*

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO



# Truplasta uppgáva nakrantíð

**- Hetta er helst truplasta uppgávan, sum føroyska landsliðið nakran tíð hevur staðið fyri. Eg veit væl, at vit vóru her í Fraklandi fyri einum ári síðani, men fortreytirnar hjá okkum eru munandi verri í dag, enn tær vóru tá, sigur Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjarin. Tað verða ikki tær stóru broytingarnar á liðnum til dystin í annaðkvøld**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

**(Belfort,Frakland):** Landsliðsvenjarin er ikki í iva um, at uppgávan er stór, nú fronsku varaheimsmeistararnir taka móti Føroyum.

- Hetta er helst truplasta uppgávan, sum føroyska landsliðið nakran tíð hevur staðið fyri. Eg veit væl, at vit vóru her í Fraklandi fyri einum ári síðani, men fortreytirnar hjá okkum eru munandi verri í dag, enn tær vóru tá. Vit hava nógv færri spælarar við royndum frá altjóða dystum. Júst tær royndirnar eru so sera nógv verdar í hesum dystunum, og tí er uppgávan – upp á seg – størri hesaferð, sigur Jógvan Martin Olsen.

**Ongar broytingar**
Ein av spurningunum er altíð, hvussu føroyska liðið verður sett saman, men hesa ferðina er neyvan tann heilt stóri ivin um, hvussu uppstillingin verður.

- Tað er eingin loyna, at eg var væl nøgdur um avrikið leygardagin. Og tí vildi tað verið løgið, um eg nú skuldi framt tær heilt stóru broytingarnar. Í løtuni er Pauli G. Hansen einasti spælarin, sum er eitt sindur ivasamur. Men verður hann tøkur, verður talan í mesta lagi um onkrar lítlar justeringar hjá okkum.

**Verjukent upplegg**
Og uppleggið verður væl saktans tað sama, sum vit kenna so væl frá føroyska liðnum?

- Tað verður tað. Kanska eisini meira verjukent, enn tað plagar at vera, tí tað er eingin ivi um, at vit koma undir eitt veldugt trýst frá fyrsta bríksli. Eftir ósigurin í Skotlandi eru fraklendingar eisini eyka trýstir, og tað vilja teir hava, at vit skulu revsast fyri.

- Eg vil siga tað so, at sannlíkindini fyri at tapa eru rættiliga stór. Og eisini fyri at vit skulu tapa stórt. Tí haldi eg, at hvør einasti minuttur, sum gongur uttan eitt franskt mál, er ein motivatión fyri okkara spælarar. Og eg vóni, at teir ikki ræðast uppgávuna, men velja at taka hetta sum eina velduga uppliving, har teir so vilja gera sítt allarbesta.



*- Eg vil siga tað so, at sannlíkindini fyri at tapa eru rættiliga stór. Og eisini fyri at vit skulu tapa stórt, sigur Jógvan Martin Olsen undan dystinum ímóti Fraklandi mikukvøldið*

## Vit eru 11 móti 11

**Hóast hann spældi á óvandum plássi, so heldur Atli Danielsen seg trívast væl á høgra bakki. Ikki minst, tá samlaða avrikið var somikið gott, sum tað var leygardagin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

**(Belfort, Frakland):** Atli Danielsen fekk nýggjan leiklut á landsliðnum, tá ið hann varð fluttur úr miðverjuni og út á bakkin leygardagin.

- Eg haldi, at tað gekk væl. Litavar megnaðu sjáldan at spæla okkum tunnar í verjupartinum, og móti dystarenda sást eisini, at teir settu ein stóran áleypara inn, soleiðis at teir ístaðin kundu senda langar bóltar móti brotsteiginum. Og tað er væl eitt tekin um, at vit røktu okkara skyldur væl.

Og setningurin um at røkja verjupartin verður væl eisini tað, sum verður ovast á skránni mikukvøldið?

- Tað er nokk einki at ivast i. Hetta er jú avgjørda heimselitan, sum vit skulu dystast við, og á pappírinum mugu vit nokk staðfesta, at vit hava ongan kjans. Hinvegin, so eru vit 11 móti 11, so vit ætla at gera okkara besta. Og so mugu vit bara vita, hvussu langt tað røkkur, heldur Atli.

- Tað var ótrúliga gott fyri okkum, at liðið í felag reistist somikið væl, sum vit gjørdu leygardagin. Sjálvandi verður uppgávan mikukvøldið nakað væl truplari, men byggja vit víðari á tað, sum vit sýndu leygardagin, so kann úrtøkan gerast heilt hampulig.

Ágangurin móti tykkum og venjarunum var stórur eftir stórtapini fyri Georgia og Skotlandi. Var hetta eisini nakað, sum merkti lagið í hópinum?

- Sjálvandi merkti tað lagið. Men tíbetur megnaðu vit at nýta hetta positivt á tann hátt, at hópurin stóð sum ein maður. Vit vildu allir, at hetta skuldi vaskast av okkum, og tað haldi eg tíbetur, at vit megnaðu leygardagin.

# Vildi hava status

**Aðrir spælarar stóðu í bíðirøð, og tí vildi Jógvan Martin Olsen hava allar spælarar inn í skiftirúmið alt fyri eitt, tá dysturin móti Litava var liguður**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Loftmiðlarnir vórðu mest sum tiknir av ræði, tá dysturin móti Litava var av. Júst sum teir vóru í ferð við at gera samrøður við onkrar av føroysku spælarunum, varð hetta steðgað, tí landsliðsvenjarin vildi hava spælararnar inni skiftirúmið.

Hetta fekk nøkur at gera tað niðurstøðuna, at venjarin ikki longur vildi tosa við føroysku pressuna, men tað var nú ikki tað, sum Jógvan Martin Olsen sjálvur legði í hendingina.

- Eg vildi snøgt sagt hava ein status alt fyri eitt. Mest sum á dystardegnum hevði eg havt tríggjar skaðar, og í dystinum stingu fleiri hendingar seg upp, sum gjørdu, at ivaðist í, hvørjar menn eg kundi taka við til Fraklands.

- Pauli fekk ein snudd, og Atli bað eisini um at verða skiftur út. Samstundis høvdu bæði Julian og Hanus skaðar at dragast við, og tí var stóri spurningurin, hvørjar menn eg kundi nýta til miðvøllin. Har hevði eg so onkran spælara í bíðistøðu, men tað var av stórum týdningi, at hesin fekk boð alt fyri eitt. Og tað var orsøkin til, at vildi hava spælararnar inn beinanvegin. Snøgt sagt, so vildi eg hava ein status uppá, hvussu menn vóru fyri, so eg eisini visti, hvørt eg skuldi taka nýggjar menn inn ella ikki, segði Jógvan Martin.